## Live av Argjum

Rás2 sendir beinleiðis av Argjum, tá AB og EB/Streymur hittast fyri aðru ferð upp á fýra dagar.

Hesa ferð er talan um landskappingardyst, men skal støði takast í fyrru hálvfinaluni millum liðini, so kann roknast við einum sera spennandi dysti.

Og Hilmar Jan Hansen fer sjálvandi at siga øllum Føroya fólki frá, hvussu leikur fer úti í Vika. Meðan 3. hálvleikur verður sendur úr Bowling-høllini á Hálsi verður fleiri ferðir stillað um út á Argir, haðani tað verður varpað út beinleiðis.

## Eysturoyaruppgerð

Tølini tala fyri, at Víkingur tekur stigini í Sarpugerði, tá B68 kemur á vitjan. Toftamenn hava nevnliga bert fingið stigini við sær úr Sarpugerði tvær ferðir seinastu tíggju árini. Hinvegin er ein av hesum sigrunum júst seinastu ferðina, at B68 var á vitjan. Nevnliga tá teir í fjør brutu eina røð, har Víkingur ikki hevði tapt í sjey dystum á rað.

## Við– ikki við

07 VESTUR
Ikki við: Jóan Petur á Stongum

Ikki við: Jónas Stenberg (óstbein), Dánjal Rói Olsen (kjálkabein)
Ivasamur: Rói Danielsen (sjúkur)

Við aftur: Bergur Midjord (lær)
Ivasamur: Fróði Clementsen

Ikki við: Niclas Joensen (leikbann)

Við: Egil á Bø (eftir leikbann)
Ivasamur: Leif Niclassen (skinnabein)

Við aftur: Vagnur Mohr Mortensen, Kristian R. Mouritsen (fótlið), Johan Ejvind R. Mouritsen (skinnabein)
Ivasamur: Rasmus Nolsøe (lær), Andrew av Fløtum (lær), Poul Thomas Dam (fótlið)

Við aftur: Balasz Sinko (leikbann)
Ivasamur: Bartal Eliasen (fótlið)

Við aftur: Heðin á Lakjuni (liðband)
Ikki við: Arnhold Joensen (vøddaskaði)
Ivasamur: Allan Joensen (vøddaskaði)

Við aftur: Øssur Dalbúð (fótlið)

Ikki við: Atli Gregersen (leikbann)

# Stigini fylgja ikki við hitanum

**Talan verður um sanna lagnuuppgerð fyri KÍ, sum einki mál hevur skorað fýra tær seinastu ferðirnar, og sum nú fær vitjan av 07 Vestur, sum tríggjar tær seinastu ferðirnar hevur vunnið stig**



*KÍ rør tungan róður í ár. Á heimavølli hava teir longu tapt eina botnuppgerð, og tað eru ráðini ikki til hesaferð*
*Savnsmynd: Álvur Haraldsen*

**FÓTBÓLTUR**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Gysarin í hesum umfarinum verður seinnapartin sunnudagin í Klaksvík. KÍ við tí stoltu søguni er botnlið. Tað eru trý stig upp til næstaftasta plássið, og isolatiónin verður uppaftur størri, um tað ikki eydnast at vinna á 07 Vestur, sum er næstaftast.

Vágamenn vóru rættiliga leitandi í fyrstu umførunum, men tríggjar tær seinastu ferðirnar hava teir vunnið úrtøku, hóast hon ikki hevur verið so stór, sum hon kundi havt verið:

- Eftir sigurin á B36 hava vit spælt javnt bæði ímóti AB og ÍF. Í móti báðum hesum liðunum hava vit verið á odda, og vit iðra okkum um, at tað ikki eydnaðist at halda tørn og harvið úr hesum báðum dystunum at vinna fýra stig meiri, enn vit nú hava.

Hetta sigur Tór-Ingar Akselsen, sum er ein av stuðlunum á vágaliðnum. Hann fegnast um, at liðið er alt meiri samanspælt:

- Fyrstu umførini vóru vit rættiliga leitandi. Tær seinastu ferðirnar hava vit spælt við umleið somu manning hvørja ferð, og tað er sjálvandi ein fyrimunur. Ímóti ÍF varð Jóhan Petur á Stongum útvístur, og tí verður tað neyðugt við nýggjum framrættaðum sentralum miðvallara. Allir hinir eru tøkir, og vit ætla okkum at vinna øll stigini í Klaksvík.

Tit vunnu 3-0 í steypakappingini í Klaksvík?

- Talan var um javna uppgerð. Einki mál varð skorað í 1. hálvleiki. Vit skoraðu fyrst. So vóru teir noyddir at satsa, og so skoraðu vit tvey mál aftrat. Tað verður torført, men eg ivist ikki í, at vit fara til Klaksvíkar við størri sjálvsáliti hesa ferð, enn tá ið vit vóru har norðuri og spældu í steypakappingini. Síðani tá hava royndirnar verið góðar hjá okkum, heldur Tór-Ingar Akselsen.

**Botnurin**

Í Klaksvík hevur úrtøkan verið so lítil sum ongantíð áður. Í tveimum teimum fyrstu umførunum eydn-

## Soleiðis plagar at ganga

| Dystur/ár | 2008 | | 2007 | | 2006 | | 2005 | | 2004 | 2003 | 2002 | 2001 | 2000 | 1999 | v-j-t | mál |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Víkingur *)-B68 | 0-1 | 4-1 | - | - | 1-1 | - | - | - | 5-2 | 0-0 | 2-0 | 2-0 | 1-2 | 3-0 | 5-2-2 | 18-7 |
| AB-EB/S | - | - | 1-2 | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | 0-0-1 | 1-2 |
| B36-NSÍ | 1-1 | - | 1-1 | 0-1 | 2-1 | 1-1 | 2-0 | 0-1 | 1-1 | 2-0 | 1-3 | 1-0 | 5-0 | 3-2 | 6-4-3 | 20-12 |
| ÍF-HB | 1-0 | - | - | - | 1-3 | - | 1-1 | - | 0-2 | - | - | - | - | 0-1 | 1-1-3 | 3-7 |
| KÍ-07 Vestur **) | - | - | - | - | - | - | - | - | - | 2-0 | - | 2-0 | 4-1 | - | 3-0-0 | 8-1 |

*) Fram til og við 2007 eru hagtølini hjá GÍ nýtt
**) Fram til og við 2008 eru hagtølini hjá FS Vágum nýtt

*Á talvuni sæst, hvussu tað hevur gingist, tá mótstøðuliðini sunnudagin hava dystast í tilsvarandi uppgerðunum seinastu 10 árini*